# Bussleið framvegis ókeypis

Á býráðsfundi hóskvøldið samtykti býráðið í Havn at skipanin við ókeypis busskoyring skal halda fram aftur næsta ár. Harumframt fara bussarnir at koyra 20. hvørt minutt í mun til tvær ferðir um tíman í dag. Kommunan hevur longu gjørt av at keypa fýra bussar afturat, soleiðis at túratalið verður økt til tríggjar ferðir um tíman í mun til verandi tvær ferðir.



# Minni útflutningur

Í alt er útflutt fyri góðar 3 mia. kr. higartil í 2007, hetta er ein minking uppá 5% í mun til sama tíðarskeið í 2006. Tað er serliga alifiskur ið framhaldandi veksur nógv í mun til sama tíðarskeið 2006. Hinvegin er útflutningsvirðið av uppisjóvarfiski og øðrum vørum nógv minkað. Verða skip og aðrar vørur ikki taldar við, er útflutningsvirðið av fiskavørum minkað við 3% í mun til sama tíðarskeið 2006, sigur Hagstova Føroya.

# Vaksin eggja børnum at lesa



*Les eina søgu við børnunum, og tey gerast góðir og glaðir lesarar sum vaksin*

**Ein nýggj kanning frá Danmarks Pædagogiske Universitetsskole, vísir ikki óvæntað, at tað serliga er lesihugur hjá vaksnum, sum smittar av á børnini og ger, at tey fáa hug at lesa**

BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Herfyri var fokus sett á lesing, vegna lesikanning, sum Solveig Debess hevði gjørt. Nú er nýggj kanning gjørd í Danmark um hvat kann gevur børnum hug at lesa.

Kanningin 'Hvad skaber en Lystlæser' er ein spurnarblaðskanning av 399 børnum umframt samrøður við seks ára gomul børn.

Kanningin prógvar, at samband er millum hugin hjá børnum at lesa og stuðli og íblástri, tey fáa frá lærarum, bókavørðum og foreldrum.

Samstundis vísir kanningin, at lesihugur í stóran mun er nakað, sum mennist í barninum sjálvum, tí tað rætt og slætt bara hevur hug at lesa og velur tað fram um okkurt annað.

Center for Børnelitteratur hevur í samstarvi við bókasøvnini í Gentofte gjørt ein frágreiðing um kanningina. Í frágreiðingini verður dentur lagdur á, hvat børn sjálvi halda hevur gjørt, at teimum dámar væl at lesa nógv, umframt at tað eisini verður komið inn á, hvørji úrslit kunnu spyrjast burtur úr kanningini. Hetta sigur Bókadeild Føroya Lærarafelags á heimasíðuni hjá felagnum.

## Avleiðingar av kanningini

Frágreiðingin mælir m.a. til:

- eina meira miðvísa, spesialiseraða formidling: bæði mótvegis heimum, har tað ikki er siðvenja at brúka bókasavnið og mótvegis teimum lesandi børnunum.
- at geva børnum/vinfólki og foreldrum/familju størri ans sum bókmentaformidlarar
- at økja fokus á týdningin av vaksnum professionellum lesarum sum fyrimyndum.

– Nógv annað forvitnisligt er at lesa í frágreiðingini, sum tey, ið hava hug at lesa, kunnu finna inni á heimasíðuni hjá Center for Børnelitteratur: www.cfb.dk undir Nyheder, sigur Bókadeildin Føroya Lærarafelags.

# Strævið at senda ein kjøtbita til Danmarkar



**Ætlar tú at geva einari útisetafamilju eitt kók av feskum tvøsti, skalt tú ígjøgnum eitt somikið umfatandi skrivstovuveldi, at tvøstið neyvan er feskt longur, tá tað liggur í pottinum á Oyrasundskollegiinum**

JÓLASUFF
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað er onki nýtt í, at ES og danskir myndugleikar eru heimsmeistarar í bureaukratii. Hetta rakar eisini viðhvørt føroyingar, bæði her á landi og í Danmark. Skalt tú senda til dømis 30 pund av kjøti niður til eina føroyska familju, skalt tú fyrst býta kjøti í tríggjar partar. Síðani skalt tú pakka teir inn hvør í sær, skriva navnið á einum í húskinum hjá móttakaranum á hvønn pakka, fyri til endans at pakka allar tríggjar pakkarnar saman í ein stóran pakka!

Soleiðis gera myndugleikarnir tað so hugaligt hjá gávumildum ommum og abbum, sum vilja gleða børn og ommubørn við einum kjøtbita um jólini.

## Kinesisk eskja

Sambært Heilsufrøðiligu Starvstovuni er tað ES og danska Fødevarestyrelsen, sum seta reglur fyri innflutningi av mati úr Føroyum til Danmarkar til privata nýtslu.

Føroyingar hava loyvi at innflyta mat til Danmarkar, antin í viðføri ella sent við pakka, soleiðis: Í mesta lagi 5 kg pr. fólk, maturin skal verða í viðføri ella sent í pakka og maturin skal verða til egna nýtslu. Men tað er loyvt at samsenda matin soleiðis, at fleiri pakkar á 5 kg í einum kolli kunnu sendast til sama bústað. Tá skal ein váttan fylgir við sendingini har navn og bústaður á øllum móttakarunum stendur á. Hvør pakki er pakkaður fyri seg til hvønn persónin í sendingini og í mesta lagi 5 kg í part.

## Søkja her og dér

Í sambandi við grind og spik eiga fólk fyrst at søkja um útflutningsloyvi frá Náttúrugripasavninum, og síðani um innflutningsloyvi frá Skov-og Naturstyrelsen. Loyvini skulu fylgja við sendingini.

Tað er als ikki loyvt at innflyta føroyskar kjøtvørur til onnur ES lond enn Danmark. Best er at venda sær til myndugleikan í viðkomandi landi, tú ætlar at hava mat við til, ella at senda mat til, og spyrja um reglurnar. Á heimasíðuni hjá Fødevarestyrelsen í Danmark, standa reglurnar fyri innflutningi av mati úr Føroyum til Danmarkar - hygg á hesi slóðini, sigur Heilsufrøðiliga Starvstovan.